Skeið við Marit Landrø, fríggjadagin 10. novembur, á Hotel Tórshavn

TÁ IÐ TAÐ HENDIR, SUM IKKI MÁ HENDA



TRUPULEIKAR AV KYNSLIGUM ÁGANGI

Skeiðið er serliga ætlað fólki, ið arbeiða millum børn og ung so sum barnaverndir, lærarar, pedagogar, dagrøktarar, sjúkrarøktarfrøðingar, barnaarbeiði innan ítrótt og samkomur o.ø.

Marit er leiðari á norska Synzygus, og hevur pastoralkliniska útbúgving innan sálarsorg og royndir frá Institutt for Sjelesorg.

Prísur: 975,- kr. Maturin er við í prísinum. Tilmeldingarfreistin er týsdagin 7. november.

SKRÁIN

09:00 morgunmatur og kunning
10:00 undirvísing
12.00 døgurði
13:00 undirvísing
15:00 drekka og eftirmeting
16:00 liðugt

Tilmelding á www.kris.fo.
Um tú ynskir fleiri upplýsingar vinarliga ring 44 81 81.

KREA.FO 478080

KRIS RÁÐGEVING FYRI SEKSUELT MISBRÚKT

KRIS í Føroyum · Heiðavegur 15 · 600 Saltangará · Tel 44 81 81 · www.kris.fo

# Jensina Olsen syngur umborð á Høganesi

**Tað hevur eydnast mentanarvikuni, sum er í Runavíkar kommunu í hesum døgum, at fáa Jensinu Olsen at syngja umborð á sluppini Høganesi í kvøld. Íslendski fólkatónleikarin, Bjartmar Guðlaugsson og okkara Kári Sverrisson fara eisini at undirhalda við sangi og tónleiki**

MENTANARVIKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í kvøld klokkan 20 verður konsert umborð á sluppini Høganesi, sum liggur við bryggju í Runavík.

Umframt íslendska fólkatónleikaran, Bjartmar Guðlaugsson av Egilstøðum og Kára Sverrisson av Toftum, verður eisini høvi at hoyra songkvinnuna Jensinu Olsen, sum vann fyrsta undanumfarið av singer/songwriter-kappingini herfyri.

Jensina, sum annars býr í Danmark, er heima í Føroyum samband við uppsetingina av sangleikinum Fame.

Tað hevur eydnast fyriskiparunum av mentanarvikuni at skipa so fyri, at hon verður við á konsertini umborð á Høganesi í kvøld.

Jensina fer eitt nú at syngja somu sangir, sum vóru sera væl móttiknir á Hafnia Lounge herfyri.

Hon er annars kend bæði úr sjónleiki og kórsangi og gav fyri nøkrum árum síðani út barnafløguna ”GrísaflísaPætur”. Saman við systrini Onnu Mariu, syngur hon eisini í bólkinum Lot, sum hevur givið út fløguna ”Veðrið eigur orð”.

Á konsertini umborð á Høganesi, sum er partur av skránni fyri mentanarvikuna í Runavíkar kommunu, fer Jensina Olsen at spæla bæði nýtt og egið tilfar.

Bjartmar Guðlaugsson er óførur fólkatónleikari – og Kári Sverrisson er ein av okkara bestu.

So, her bíðar nógv gott umborð á Høganesi í kvøld.




Byrjað verður við landsfundi og aðalfundi á Hotel Hafnia frá kl. 09:30 – 15:00
Skrá sambært lógum felagsins

**Veitsla í B36-húsinum kl. 19:00**

Menu
Kalvafiska-soufflé við breyð og smør
Lambasteik við soðsós grønmeti og hvítum eplum
Leskilig heimagjørd sjokulátakøka við vaniljuísi

»Stig fyri stig« dansur við Fimmboða og vinmonnum

**Kostnaður fyri veitsluna er kr. 150,00 pr. persón**

Tilmelding innan 3. november á telefon 512494 ella við telduposti: post@sjalvstýrisflokkurin.fo

**Gistingartilboð frá Hotel Hafnia**
Einkultkamar: kr. 500,00 fyri náttina – íroknað morgunmat
Dupultkamar: kr. 700,00 fyri náttina – íroknað morgunmat

*Hetta skal bíleggjast hjá Hotel Hafnia á tel. 313233*

Møtið fjølment!

Sjálvstýrisflokkurin
Áarvegur 2 · FO-100 Tórshavn

VASTI 459010

SØLUSAMSKIPARI

**Samferðsludeildin á Strandferðsluni sóknast eftir dugnaligum sølusamskipara**

Sum sølusamskipari fært tú ábyrgd av tilrættalegging og samskipan av ferðaseðlaskipanini á Bygdaleiðum og Oyggjaleiðum.

Høvuðsuppgávurnar eru:
- at menna og fyriskipa tænastur til kundabólkarnar
- at umsita ferðaseðla- og hagtalsskipanina Buscom
- at umsita útgerð og viðlíkhald av ferðaseðlamaskinunum
- at fyriskipa dagligu rapporteringina til kundaavrokning og hagtøl
- at fyriskipa eftirlit við ferðaseðlasøluni
- at fyriskipa mannagongdir, vegleiðingar og undirvísing

Talan er um eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú eisini arbeiðir við øðrum uppgávum, sum fevna vítt innan virksemið hjá Samferðsludeildini. Eitt nú fært tú um hendi at røkja heimasíðutænastuna og uttanhýsis kunningina um samferðslu. Av størri projektum, sum tú verður við í, kann nevnast fyrireikingar til nýggja ferðaseðlaskipan.

Uppgávan hjá Samferðsludeildini er at skipa almenna samferðsluøkið. Vit leggja til rættis, stýra, selja, samskipa og kunna um almennu ferðsluna á sjógvi og landi. Árliga sølan er uml. 43 mió. kr.

**Førleikakrøv**
Vit rokna við, at tú
- hevur útbúgving ella royndir innan handil, logistikk ella líknandi,
- hevur gott hegni og góðan førleika innan KT
- er røkin, málrættað/-ur og arbeiðir sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni og góðan tænastuhugburð
- orðar teg væl, bæði munnliga og skrivliga

**Umsókn og treytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er 13. november kl. 12. Send umsóknina við prógvskjølum og møguligum viðmælum til: Strandfaraskip Landsins, stílað: Starvsfólkadeildin, Boks 88, FO-110 Tórshavn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Andrass Jensen, deildarleiðara, á telefon 34 30 00 ella t-post anj@ssl.fo

sansir.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS